

*Másin er drúgvur á leiðini til eystastu oyggjar okkara – Fugloy og Svínoy. Skipið er tó rættiliga gamalt, og spurningurin er, hvat gerast kann ella skal við skipið í framtíðini*

# Skipini eldast og krøvini vaksa

**Fólk ynskja betri tænastustøði umborð á skipunum hjá Strandferðsluni, samstundis sum tey gerast eldri og eldri. – Vit arbeiða við einum tilmæli um framtíðina hjá flota okkara, sigur stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen. Og peningur skal sjálvandi fylgja við!**

FLUTNINGUR
*Snorri Brend*

**Strandferðslan:** So hvørt sum árini ganga gerst tann skipaflotin, sum Strandferðslustjórin hevur ábyrgdina av bara eldri og eldri.

Og samstundis seta fólk onnur og størri krøv til samferðslu og tænastustøði í dag, enn tá hesi nýggju skipini komu í flotan á sinni.

Hinvegin, so hava tey á Strandferðsluni ikki sitið hendur í favn.

– Vit hava arbeitt við einum tilmæli um, hvat gerast skal við øll skipini hjá okkum.

– Tað er eingin loyna, at tey eru gomul. Og fyri mong teirra er talan ikki um haldbari í framtíðini, sigur Kristian Davidsen við Sosialin.

Her verður serliga hugsað um tey elstu skipini hjá Strandferðsluni. Tað elsta skipið - Barsskor – er bygt í 1929, men liggur í løtuni við bryggju í Klaksvík.

### Gott eykaskip

Okkurt av skipunum hjá Strandferðsluni er longu lagt, og seinni í ár verður í øllum førum eitt teirra lagt aftrat.

Tá nýggja samferðsluhavnin á Syðradali varð tikin í nýtslu, loysti henda samstundis Barsskor av sum flutningsleið hjá kalsoyingum.

Hetta skipið varð síðani lagt við bryggju, og liggur har við sama lag. Enn er ikki tikin støða til, hvat gerast skal við tað.

Tá Norðoyatunnilin verður tikin í nýtslu í vár verður ikki neyðugt við hvørki Dúgvuni og Ternuni um Leirvíksfjørð longur.

Dúgvan er fyri fáum døgum síðani sett á sølulistan, men ætlanin er at hava Ternuna í flotanum framyvir.

– Dúgvan er til sølu fyri einar tríggjar milliónir krónur. Spurningurin er kortini, um vit fáa so nógv fyri hana, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Hinvegin, so er Ternan í góðum standi, og verður tí eykaskip til siglingina um Skopunarfjørð.

– Við einum so góðum avloysaraskipi, fara sandoyingar ikki at merkja stórvegis til at eitt annað skip røkir farleiðina hjá teimum, sigur Kristian Davidsen.

Spurningurin um Rituna er vorðin aktuellur aftur, eins og greitt er frá aðrastaðni í blaðnum.

### Tilmæli á veg

Kristian Davidsen sigur, at tey hava arbeitt við einum tilmæli, sum skal handast Innlendismálaráðnum í næstum.

Arbeiðið við hesum tilmælinum hevur tikið sína tíð, serliga tí so nógv orka varð løgd í ætlanina við nýggja Smyrli.

- Men nú fara vit so at seta ferð aftur á arbeiðið við hesum tilmælinum, sigur hann.

Gongst sum ætlað, so er ætlanin at hetta tilmælið skal verða liðugt í ár.

Í hesum tilmæli er ætlanin at koma við eini lýsing av støðuni hjá fýra teimum elstu skipunum – Másanum (bygdur í 1959), Sildberanum (1979), Rituni (1971) og Sam (1975).

– Hóast eg ikki kann siga nakað ítøkiligt enn, so er í øllum førum greitt, at okkurt má gerast í framtíðini, sigur Kristian Davidsen.

## Høgur miðalaldur

At skipini hjá Strandferðsluni eru gomul sæst eisini av skjølunum til fíggjarlógina fyri 2006.

Her stendur, at skipini hava høgan miðalaldur, og tí er neyðugt at fremja størri og átroðkandi umvælingar á ávísum skipum og at byggja nýggj skip.

Alt hetta skal gerast fyri at nøkta flutningstørvin og krøvini frá Skipaeftirlitinum og klassanum. Eingin ætlan um nýbygging er tó í ár, men hetta er tó ein partur av langtíðarætlanini hjá stovninum.

## FAKTA

Hesi skipini eru í dag í flotanum hjá Strandferðsluni:

Smyril (2005)
Smyril 1 (lagdur. Seldur)
Dúgvan (1969)
Teistin (2001)
Sam (1975)
Ternan (1980)
Ritan (1971)
Sildberin (1979)
Másin (1959)
Súlan (1987)
Barsskor (lagdur)

## Norðoyggjar afturvið góðum døgurða

**Keypmannahavn:** Føroyahúsið fer henda komandi mánaðin at varpa ljós á fýra av norðastu oyggjaum okkara.

Hetta verður gjørt við teir serstøku døgverðarnar týsdagar. Í komandi viku verður lagt fyri við Kalsoynni og vikuna eftir við Kunoynni. Seinni verða fyrst Borðoyggin og síðani Viðoyggin viðgjørdar.

Hetta tiltakið verður fyriskipað, nú Norðoyatunnilin fer at lata upp seinni í vár.

Ætlanin er so at siga eitt sindur frá um hesar oyggjarnar, eftir at fólk hava etið tann góða døgverðan, sum Føroyahúsið borðreiðir við.

**sb.**



*Klaksvík er vøkur – eisini úr luftini*

## Neyðugt við livandi skótarørslu

**Landsfundur:** – Skal skótarørslan framvegis og at røttum kallast ein rørsla, so er neyðugt at hon er livandi og ikki bert yvirlivandi, sigur Trygvi Sigurðsson, sum er ovasti fyri KFUM-skótarnar í Føroyum.

Leygardagin 4. februar hava KFUM-skótarnir árliga landsfund sín, og á hesum fundi verða nógv mál um rødd. Eitt teirra verður uttan iva spurningurin um at fáa skótarnar at støðast.

– Tilboðini til teirra eru nógv og krøvini stór, um ein skal vera við í ymiskum virksemi. Tað eru tíbetur framvegis nógv fólk, sum ynskja at nýta frítíðina til skótaarbeiðið.

– Og sum støðan er nú, so eru tað nøkur støð sum ynskja at endurstovna skótaarbeiðið. Hetta frøast vit sjálvandi um, sigur Tryggvi.

Sambært tølum frá skótunum sjálvum, so hevur talið av limum verið í minking tey seinastu fimm árini. Talið hevur kortini ligið millum 700 og 750 limir.

Men sambært nýggjastu tølunum so er gongdin við at venda eitt sindur. Í 2004 vóru 710 KFUM-skótar, og við árslok í fjør var talið vaksið til 740.

**sb.**



*KFUM-skótar finnast á nógvum støðum kring landið, og onkrastaðni er áhugi fyri at endurstovna skótaliðið*

(savnsmynd)